## Rýma úr Noregi

Tey seinastu árini hava altsamt fleiri norskir pensjonistar valt at búseta seg í øðrum londum, og nýggj tøl vísa, at talið veksur skjótt. Í dag búgva 41.000 norskir pensjonistar í øðrum londum, og teir fingu í fjør tríggjar mia. krónur í pensjón úr Noregi. Frágreiðingin hjá teimum, sum eru flutt, er, at tey fáa meiri fyri pengarnar uttanlands, veðurlagið er betri enn heima í Noregi, og so vilja tey fegin sleppa at njóta tey seinastu árini.

## Drúgvasta kvinnan

Íslendski uttanríkisráðharrin, Valgerður Sverrisdóttir, kann nú rósa sær av at vera tann kvinnan, sum hevur sitið longt sum ráðharri í Íslandi. Í dag hevur hon verið ráðharri í 2.605 dagar, og so leingi hevur eingin kvinnan verið ráðharri í Íslandi fyrr. Tað gamla metið átti Jóhanna Sigurðardóttir, sum var ráðharri í 2.514 dagar. Valgerður Sverrisdóttir gjørdist ráðharri tann 31. desember í 1999 og var fyrst ráðharri í ídnaðarmálum.



# Tunnusláttur á Ve



*Ein fittur tikari*





*Jónar og Borgar gjørdust kattakongar*





FØSTULÁVINT

*Lagt til rættis hava: Anna Rødgaard og Manja Johansen úr Tvøroyrar Skúla*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Blíðskapurin var stórur, tá Sosialurin legði beinini framvið á Velbastað í morgun, tá tunnusláttur var fyri børnunum í nýggja dagstovninum. Hetta er fyrstu fer, at tey skipa fyri føstulávintshaldi í nýggja stovninum, sum lat upp 19. august. Í barnagarðsstovuni og í vøggustovuni vóru 19 børn, og øll vóru ílatin til føstulávint. Seinni í dag fara tey at dansa føroyskan dans, og síðani fáa tey føstulávintsbollar.

